

B68 –GÍ 2-2 (1-1):

# Tóm kensla í báðum legunum

**Álopshugaðu gøtumenninir løgdu bragdliga fyri, men í løtum vóru teir so mikið kroystir, at toftamenn væl og virðiliga høvdu uppiborið at fáa eitt stig**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Úrslitið í oyggjauppgerðini á Svangaskarði var 2–2. Tað var hvørgin parturin nøgdur við. GÍ misti møguleikan at vinna gull, og B68 megnaði ikki at fáa so mikið burturúr, at teir kundu sletta vágbingar av sær í kappingini um bronsukrónurnar.

Áskoðararnir kundu í dýrdarveðrinum vera væl nøgdir. Kanska høvdu teir ikki verið vitni til mest poleraða fótbóltsspælið, sum hevur verið at sæð í summar. Men teir høvdu verið vitni til høga ferð og spentar støður í báðum endum, og so kundu legurnar báðar skiftast um at fegnast um málini.

## Málini

GÍ kom á odda, tá bara fýra minuttir vóru farnir. Poul Henning Jacobsen, sum var kærkomin endurkomin arbeiðsmegi á miðvøllinum – gøtumenn saknaðu hann nógv ímóti NSÍ – potaði til Henning Jarnskor, sum av baklinjuni í vinstru legði flatt og hálvkiksað innfyri. Men bólturin slapp at trilla mitt innfyri málið, har arbeiðssami og altíð vandamikli toppskjúttin Helgi L. Petersen var fyrstur á og stýrdi kúluni í kassan. Harvið hevði hann tryggað sær at skora í hvussu so er eitt mál í miðal fyri allar átjan landskappingardystirnar – sjálvt um honum ikki skuldi eydnast at skora í síðsta umfarinum.

B68 svaraði aftur dygst undan hvíldini. Eftir eitt av ikki nógvum gjøgnumbrotum í vinstru, royndi John Heri Dam – stóð ikki so sterkur í myndini hesa ferð, sum hann hevur gjørt síðani summarsteðgin – at senda innfyri. Bartal Eliassen tóktist hava gloymt, at tað framvegis var fótbóltur og ikki flogbóltur, sum tað snúði seg um. Í hvussu so er pareraði hann við arminum, og dómarin bríksladi fyri brotssparki.

Súni Fríði Johannesen plagar at vera fastur skjútti úr ellivu metrum hjá B68. Hesa ferð peikaði hann á liðformannin. Fróði Benjaminsen, sum aftur hesa ferð var sera eyðsýndur á miðvøllinum, takkaði fyri, tá hann sendi Hallur Hansen, sum aftur hesa ferð vísti, hvussu væl hann dugur at lesa spælið, í annað borðið og trillaði bóltin inn við stólpanum hinumegin. Harvið lyfti Fróði seg framum Súna Fríða sum besti B68 málskjúttin.

GÍ kom framum aftur eitt gott korter inn í 2. hálvleik. Óli Hansen, sum Messias støðugt hevði stórar trupulleikar av, var púra leysur, tá hann stútaði frísparksinnlegg úr høgru frá Janik í kassan.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki royndi B68 at spenna álopsbogan. Marcello, sum sammett við í fjør hevur staðið sera veikur í ár, kom inn, og hann hevði bara verið lítla løtu á vøllinum, tá hann javnaði. Eftir innlegg úr vinstru, endaði bólturin hjá Marlon Jorge (stóð sterkur í myndini). Marlon lyfti afturum seg sjálvan til púra leysa Marcello, sum úr stuttari fjarstøðu og eitt sindur til høgru sendi flatt í handara síðunetið. So var orduligur sambadansur, og tað var um reppið, at brasiliumenninir fóru uppfrá. Men saksisparkið hjá Marcello endaði væl omanfyri málið.

## Ovurfólkað á miðvøllinum

Serliga í 1. hálvleiki var talan um nógv aftur og fram, uttan at tað eydnaðist at fáa rættuligt tak á spælinum. Tað var ógvuliga trongt á miðvøllinum, og fyrstu løtuna tóktist tað, sum um gøtumenn vóru yvirmannaðir bæði í verjuni og álopinum.

B68 byrjaði við bara Súna Fríða Johannesen á toppinum. Ætlanin tóktist vera, at ein av miðvallarunum og so John Heri Dam í vinstru og Arnold Joensen í høgru skuldu vera skjótir fram. Hetta eydnaðist bara partvís. Høgra síðan – Marlon Jorge og Arnold Joensen – riggaði væl, men trupulleikin var, at Súni Fríði Johannesen so at siga hvørja ferð hevði tríggjar ella fýra gøtumenn kring seg, tá innleggini komu.

GÍ kundi havt lagt seg avgerandi framum tíðliga. Tað var óneyðugt at hava tríggjar í miðverjuni, og tí smoygdi Leivur Hansen sær ofta fram í álopið. Eingin ansaði honum, og tvær ferðir hevði hann eftir innlegg úr høgru sera góðar møguleikar at gera mál, men royndirnar vóru ikki nóg neyvar.

Toftamenn justeraðu, og Súni Fríði Johannesen átti at havt javnað á hálva tímanum. Eftir mynding av álopi úr verjuni og fram í vinstru, fór skrábólturin frá Jákupi Eli Olsen upp um verjuna. Álopsmaðurin tamdi átta metrar úr málinum, men skotið rakti í Henning Jarnskor, sum lá á válinum.

Tá GÍ kom framum 2–1, var tað eftir at B68 í góða løtu hevði havt støðugt trýst. Spælbýtið javnaði seg eftir GÍ leiðslumálið, og tá B68 hevði javnað, var tað heilt stuttligt, tí tá vildu báðir partar hava sigursmálið, og so løgdu teir ikki so nógv í at verja.

**Dysturin í tølum**

**B68-GÍ 2-2 (1-1)**
0-1: Helgi L. Petersen 4
1-1: Fróði Benjaminsen (br.) 44
1-2: Óli Hansen 61
2-2: “Marcello” Marcelino 75
**Dómari:** Lassin Isaksen (KÍ)

**B68:** Kjartan Nesá – Oleif Joensen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira – Arnold Joensen, Marlon Jorge, Fróði Benjaminsen, Jan C. Dam, Jákup Eli Olsen, John Heri Dam – Súni Fríði Johannesen
**GÍ:** Hallur Hansen – Leivur Hansen, Bartal Eliassen, Poul Ennigarð – Áslakur R. Petersen, Magni Jarnskor, Poul Henning Jacobsen, Zdzislaw Janik, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen



EB/Streymur-VB 1-3 (1-1):

# Vágbingar stríðast fyri bronsuni

**Hóast heimaliðið legði seg fram um í fyrra hálvleiki, vóru tað gestirnir, sum fóru við øllum, eftir at teir høvdu skorað trý mál**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*



*Til tíðir leikaði hart á framman fyri VB-málinum, men vágbingarnir megnaðu tó at vinna sær tey trý stigini*

*Mynd: Sofus Johannesen*

EB/Streymur fekk góða byrjan í dystinum ímóti VB, men leiðslan helt ikki, og tá avtornaði, vóru tað vágbingar, sum vunnu við tveimum málum.

EB/Streymur er sloppin úr vandanum fyri at flyta niður, og teir hava hugt meira upp enn niður á stigatalvuni seinastu umførini. Tapið móti HB seinast og VB hetta vikuskifti ger tó, at teir ikki klára at lyfta seg upp av triðaftasta plássinum, har teir hava ligið seinastu mongu umførini.

VB hevði leikliga yvirvág í dystinum á Eiði sunnudagin, men EB/Streymur var allatíðina við, og seinasta partin av dystinum royndu teir at trýsta fyri at javna VB-leiðsluna. Hetta eydnaðist ikki, og ístaðin var tað VB, sum setti punktum við at gera tað til 3-1.

## Tvey mál

EB/Streymur kom á odda í fyrra hálvleiki, tá vongverjin í vinstru, Jákup Martin Joensen, var fyrri á eini langari sending enn málverjin hjá VB. Jákup Martin rundaði málverjan og fekk sneitt bóltin í málið til 1-0.

Áðrenn hálvleik javnaði VB, og tað var vandamikli Birgir Jørgensen, sum stóð fyri hesum máli. Uppspælið millum Robert Cieslewicz og Krzystof Popzynski endaði við, at spælandi venjarin hjá VB legði bólt inn fyri málið, og har var Birgir Jørgensen fyrstur á. Hann stútaði bóltin í málið, og so var 1-1.

Hetta var støðan í hálvleikinum, og tað tóktist verða rímuligt, soleiðis sum gongdin í dystinum hevði verið.

## Marek staðfesti

VB legði betri fyri í seinna hálvleiki, og teir høvdu yvirvág í spælið, hóast EB/Streymur royndi at hótta við kvikum mótspæli í røttu løtunum.

Birgir Jørgensen legði VB á odda, tá hann fór sjálvur av miðjum vølli. Hann lyfti bóltin upp um tveir verjumenn, og so setti hann beina kós móti málinum. Hóast skotið ikki var sannførandi, endaði bólturin í málinum.

Hetta málið fekk EB/Streym at leggja meira fyri fram eftir vøllinum. Heimaliðið hevði dúvað meira upp á kontraspæl, men seinasta partin av dystinum royndu teir at trýsta.

VB royndi eisini at halda leiðsluna, og tí duttu teir nakað aftur á vøllin. EB/Streymur hevði fleiri royndir, men ongantíð var veruligur vandi á ferð. Andzrei Pacek og Alfred Jacobsen vóru millum teir, sum royndu seg, men einki kom burtur úr.

Tá fáir minuttir vóru eftir at spæla, staðfesti VB sigurin, tá póllendingurin, Marek Vierzbicki, skoraði. Hann langaði til úr 25 metrum, og bólturin streyk í málið.

Sigurin hjá VB hevur við sær, at vágbingar, sum komandi vikuskiftið mugu lata B36 føroyameistarasteypin, hava møguleikan at vinna bronsumerkini. B68 situr í løtuni á triðfremsta plássinum, men um toftamenn snáva í seinasta dystinum, so hevur VB møguleikan at vinna bronsuna.

Men uppgávan hjá VB er stór í sær sjálvum, tí B36 fer eftir 14. sigrinum á rað í hesum kappingarárinum.

### Dysturin í tølum:

**EB/Streymur-VB 1-3 (1-1)**
1-0: Jákup Martin Joensen
1-1: Birgir Jørgensen
1-2: Birgir Jørgensen
1-3: Marek Vierzbicki
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**EB/Str.:** Gunnar á Steig – Esmar Eiðisgarð, Alfred Jacobsen, Ólavur Poulsen, Christian Carlsson, Jákup Martin Joensen – Knút Vesturtún, Andzrei Pacek, Eyðfinn Joensen – Sorin Anghel, Jón Sigurd Gleðisheygg
**VB:** Bjarni Johansen – Palli Augustinussen, Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Kári í Lágabø, Jón Pauli Joensen – Gisli Sveinbjørnsson, Marek Vierzbicki, Krzystof Popzynski – Birgir Jørgensen, Robert Cieslewic

NSÍ-B71 3-2 (2-2):

# NSÍ hevði stórt stríð av B71

**Sandingar løgdu bragdliga fyri í Runavík, men enn einaferð mistu teir eina tvey máls leiðslu. NSÍ javnaði áðrenn hálvleik, og í seinna hálvleiki gjørdu teir sigursmálið**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

B71 tók NSÍ á bóli, tá liðini hittust í Runavík sunnudagin. B71 skoraði tvey mál tíðliga í dystinum, og so høvdu runavíkingar stórt stríð fyri framman.

Eli Hentze gjørdi ein rættiligan vørr, tí hann stóð fyri báðum málunum, sum B71 fekk.

Longu tá slakir 15 minuttir vóru spældir, lá Eli fram við fyrru ferðina. B71 kom ímillum uppspælið hjá NSÍ, og Kári Reynheim fekk fatur á bóltinum. Hann legði eina sending fram um NSÍ-verjuna, og har var Eli fyrstur á bóltinum og stútaði upp um málverjan, sum var komin út ímóti.

Tey, sum hildu at nú fór NSÍ at svara aftur, fóru skeiv, tí tað var B71, sum økti, áðrenn NSÍ rættiliga fekk fótin fyri seg.

Aftur var tað Eli Hentze, sum syrgdi fyri málinum. Hesaferð kom Eli ímillum ein sending frá NSÍ-verjumanni til málverjan, og so var tað barnamatur hjá roynda álopsmanninum at skora. NSÍ-verjan var ótrygg fyrsta partin av dystinum, og tað gjørdi B71 sær dælt av.

## Tøtt mál

B71 hevur fleiri ferðir roynt at verið á odda við tveimum málum, uttan at teir fingu nakað burtur úr. Í fjør kom hetta fyri einar fýra ferðir, so tað var kanska ikki óvæntað, at leiðslan skuldi rúka.

Í seinastu minuttunum fyri hálvleikssteðgin fekk NSÍ tvey tøtt mál. Fyrsta var tað Dánial Hansen, sum hesaferð spældi í miðverjuni, tí Djóni Joensen var ikki við, sum skoraði. Hann fekk fatur á einum bólti á B71-hálvuni, snýtti aftasta mann hjá B71 og so høgdi hann til úr einum 20 metrum. Bólturin streyk beint í málið, og so var NSÍ inni í dystinum aftur.

Løtu seinni javnaði NSÍ, og hesaferð var tað Gert Langgaard, sum stóð fyri málinum.

## Jens Martin bjargaði

Í seinna hálvleiki royndi heimaliðið at fáa triðja málið, sum kundi geva teimum sigurin.

Hetta eydnaðist eisini, tá ein slakur tími var spældur av dystinum. Sigursmálið gjørdi kviki álopsmaðurin, Sonni L. Petersen, og tað kom eftir gott uppspæl og innlegg til handaru stong, har Sonni stútaði bóltin í málið.

Eftir málið tók B71 alsamt meira yvir, og teir fóru at trýsta NSÍ-liðið, sum gjørdi onkrar verjusinnaðar skiftingar, so sigurin skuldi bera heim.

Men tað var landsliðsmálverjin, Jens Martin Knudsen, sum mátti gera nýtslu av sínum evnum, fyri at NSÍ skuldi fáa øll trý stigini burtur úr hólmgonguni við botnliðið.

Tvær ferðir bjargaði hann frágera væl, og serligu í einu støðuni var talan um framúr bjarging. Miðvallarin Jón Brekku smekkaði til, bólturin rakti ein NSÍ-spælara, og broytti kós. Bólturin hevði kós móti málhorninum, men onkursvegna fekk Jens Martin vart fyri.

Jónsvein Thomsen hevði eisini tvær góðar royndir, men einki mál spurdist burtur úr.

B71 vóru vónbrotnir um, at teir enn einaferð høvdu mist eina góða leiðslu, men tað var lítil uggi hjá teimum, at vágamenn vóru fyri tapi á heimavølli. Nú er ein dystur efir at spæla, og B71 er eitt stig frammanfyri FS Vágar, sum er aftast í deildini.

### Dysturin í tølum

**NSÍ-B71 2-3 (2-2)**
0-1: Eli Hentze
0-2: Eli Hentze
1-2: Dánial Hansen
2-2: Gert Langgaard
3-2: Sonni L. Petersen
**Dómari:** Birgir Sondum
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Rúni Rasmussen, Arnfinn Langgaard, Dánial Hansen, Jónstein Petersen – Gert Langgaard, Brynjálvur Nielsen, Sjúrður Jacobsen, Eddie Mikkelsen – Ken Nónklett, Sonni L. Petersen
B71: Valdemar Nowisci – Hans Jørgen Djurhuus, Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen, Bjørn Thorsteinsson, Sverri Kjærbo – Jón Brekku, Svenning Hansen, Eli Hentze – Kári Reynheim, Kári Nielsen

